**Kvæðatilfar - Nr: 18**

# Læraravegleiðing

**Vegleiðandi floksstig:** 4. – 9. flokk
(2. - 3. flokkur)

**Uppgávuslag / heiti:** Vit leggja í røttu raðfylgju

**Vegleiðing:**

Næmingarnir eru tveir ella tríggir saman.

Av tilfari skal hvør bólkur nýta eitt eintak av blandaðum ørindum, (sum dømi er Brestis kvæði viðfest), saks, límstift og blonk A4 ørk at líma á. Lærarin skal hava kvæði á fløgu.

Næmingarnir klippa tekstin sundur, soleiðis at eitt ørindi er á hvørjum lepa. Nú skulu næmingarnir leggja tey í røttu raðfylgjuna.

Tá næmingarnir halda seg vera vísar í, at raðið er rætt, spælir lærarin kvæði fyri teimum. Næmingarnir skulu síðani líma ørindini føst í tí raðfylgju á A4 arkið, sum teir halda vera rætt.

Lærarin tekur ørkini inn at rætta.

**Onnur hugskot:**

Ístaðin fyri at nýta tekstin kunnu næmingarnir nýta myndir til hvørt ørindi. (Sí uppgávuna Teknirøð). Hetta ger tað eisini møguligt hjá smærru flokkunum at nýta uppgávuna.